# Róligt vikuskifti

**Bara tveir dystir eru á skránni í bestu kvinnudeildini hetta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir tveir dystir á rað, har tað ikki hevur borið mótstøðuliðnum til at koma til Klaksvíkar, er lítið at ivast í, at tær hjá Stjørnuni nú gleða seg til, at tær aftur sleppa at spæla hondbólt.

Eftir ikki sjálvbodna steðgin í dystum, er kanska vandi fyri, at dystarvenjingin hjá oddaliðnum ikki er optimal í løtuni, men tað eru so ikki ráð til nakrar umberingar fríggjadagin.

Mótstøðuliðið úr Søljuni eru uttan iva svangar eftir stigum, nú tær at kalla hava mist takið í heiðursmerkjastríðnum, og tí er einki at ivast í, at tær vilja leggja nógv fyri, til tess at fáa stig til høldar hesaferð.

Í fyrra dystinum millum liðini gekst einki serligt hjá Søljuni. Tær taptu so dyggiliga við 39-22, tá tær vitjaðu í Klaksvík.

Ein annar dystur verður í kvinnukappingini um vikuskiftið. Hesin verður í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti Kyndli. Í fyrra dystinum millum liðini var VÍF við yvirlutan. Fyrst og fremst takkað verið Ioanu Rápa, sum skeyt ikki færri enn 18 mál í 29-25 sigrinum. So er spurningurin, um Kyndil í størri mun fær byrgt upp fyri rumenska stórskjúttanum hjá VÍF hesaferð.

# Toppdystur í Sørvági

*Størsti spenningurin hetta vikuskiftið tykist vera í Sørvági, har tey bæði oddaliðini í mansdeildini skulu dystast*



Størsti spenninguyrin í flogbóltskappingini um vikuskiftið tykist vera í Sørvági, har mansliðið hjá SÍ tekur ímóti Mjølni.

Mjølnir hevur annars verið at kalla einaráðandi hetta kappingarárið, men við tapinum fyri Fleyr seinasta vikuskifti lótu teir av álvara upp fyri eini spennandi kapping.

So er spurningurin, hvørt tað skal eydnast SÍ at ota seg einsamalt fram í oddin, ella um talan bara var um ein lítlan kiksara hjá Mjølnir seinast.

Hin mansdysturin um vikuskiftið verður á Kambsdali, har Fleyr vitjar stigaleysa ÍF. Tað er í øllum førum ein dystur, sum Fleyr eigur at vinna, og tað skulu teir eisini, um ætlanin er at fylgja við frammi í oddinum.

Hjá kvinnunum tykist lítil ivi vera um, at tey trý fremstu liðini øll skulu fáa fult. TB vitjar hjá KÍF, sum hevur staðið seg hampuliga væl í ár, men spurningurin er tó, um tað er nóg mikið til at nerta TB.

Mjølnir hevur ikki verið til at steðga higartil, og lítið er at ivast í, at teirra sigursrøð heldur fram, tá vitjað verður í Sørvági.

Seinasti dysturin i bestu kvinnudeildini er millum ÍF og Dráttur. Dráttur hevur seinastu vikurnar víst, at tær væl kunnu arga fremstu liðini, og so er spurningurin, hvørt tær megna at halda góðu taktunum koyrandi.

**-jm**

## Hondbóltsstøður

**SUNSET KAPPINGIN**
**KVINNUR**

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 6 - 0 - 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 2 Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 212 | 158 | 54 | 10 |
| 3 Stjørnan | 5 | 5 - 0 - 0 | 138 | 104 | 34 | 10 |
| 4 Søljan | 7 | 4 - 0 - 3 | 204 | 173 | 31 | 8 |
| 5 VÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 162 | 175 | -13 | 6 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 150 | 186 | -36 | 3 |
| 7 Kyndil | 6 | 1 - 1 - 4 | 120 | 167 | -47 | 3 |
| 8 Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 119 | 214 | -95 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
**MENN**

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 6 - 0 - 1 | 200 | 172 | 28 | 12 |
| 2 Kyndil | 7 | 5 - 0 - 2 | 221 | 166 | 55 | 10 |
| 3 H71 | 7 | 4 - 0 - 3 | 216 | 201 | 15 | 8 |
| 4 KÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 179 | 204 | -25 | 6 |
| 5 Neistin | 7 | 2 - 0 - 5 | 195 | 220 | -25 | 4 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 0 - 6 | 182 | 230 | -48 | 2 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 6 | 6 - 0 | 18 | 4 | 14 | 12 |
| 2 TB | 6 | 5 - 1 | 15 | 6 | 9 | 10 |
| 3 KÍF | 6 | 4 - 2 | 12 | 9 | 3 | 8 |
| 4 Dráttur | 6 | 2 - 4 | 13 | 13 | 0 | 4 |
| 5 ÍF | 6 | 1 - 5 | 5 | 15 | -10 | 2 |
| 6 SÍ | 6 | 0 - 6 | 2 | 18 | -16 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 5 | 4 - 1 | 13 | 5 | 8 | 8 |
| 2 Mjølnir | 5 | 4 - 1 | 13 | 6 | 7 | 8 |
| 3 Fleyr | 5 | 3 - 2 | 11 | 7 | 4 | 6 |
| 4 Fram | 5 | 1 - 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 ÍF | 4 | 0 - 4 | 1 | 12 | -11 | 0 |

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Br.by (S) | 17 | 12 - 4 - 1 | 29 | 9 | 20 | 40 |
| 2 FCM | 17 | 9 - 3 - 5 | 27 | 23 | 4 | 30 |
| 3 OB | 17 | 9 - 2 - 6 | 41 | 22 | 19 | 29 |
| 4 Viborg | 17 | 7 - 6 - 4 | 19 | 15 | 4 | 27 |
| 5 AGF | 17 | 7 - 5 - 5 | 30 | 28 | 2 | 26 |
| 6 FCK (M) | 17 | 7 - 5 - 5 | 28 | 26 | 2 | 26 |
| 7 AaB | 17 | 7 - 3 - 7 | 27 | 24 | 3 | 24 |
| 8 Esbjerg | 17 | 6 - 4 - 7 | 34 | 30 | 4 | 22 |
| 9 Silkeborg | 17 | 5 - 3 - 9 | 25 | 32 | -7 | 18 |
| 10 Rand. FC | 17 | 3 - 5 - 9 | 19 | 32 | -13 | 14 |
| 11 Herfølge | 17 | 4 - 2 - 11 | 14 | 36 | -22 | 14 |
| 12 FC N.sj. | 17 | 3 - 4 - 10 | 19 | 35 | -16 | 13 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

# Ikki bara oddabrak

Umframt mansdystin í Vestmanna, so verða eisini tveir aðrir dystir leiktir í Atlantic Airways kappingini hetta vikuskiftið.

Báðir dystirnir verða leiktir í Hoyvíkarhøllini, og leygardagin verður tað so Neistin, sum vitjar KÍF. Hetta tykist vera ein dystur um, hvørt teirra skal royna at elta liðini, sum í løtuni eru á heiðursmerkjaplássunum.

Eftir seinastu avrikini hava báðir partar eisini nakað at prógva, so talan kann væl gerast um ein spennandi dyst, har intensiteturin er í hæddini.

Sunnudagin tekur H71 so móti StÍF. Tað líkist einum dysti, sum hoyvíkingarnir eiga at vinna trygt. Og undir øllum umstøðum eru teir noyddir til tað, um teir ikki heilt skulu missa takið í oddinum.

Soleiðis sum StÍF hevur leikt higartil í ár, so skuldi tann uppgávan heldur ikki verið ógjørlig, men strandingar hava ofta fyri at gera tað óvæntaða, og so er spurningurin, hvørt tað hevur eydnast teimum at snarað barometrinum.

**-jm**

# Randers omanfyri strikuna

**Tveir útsettir dystir vóru á skránni hóskvøldið, og í morgin verður síðsta umfarið spælt, áðrenn flestu feløgini fara í vetrarfrí**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Alt síðani fyrsta umfarið í hesum kappingarárinum varð spælt um ólavsøkumundið, hava uppflytararnir úr Randers verið undir niðurflytingar strikuni. Tað eru teir ikki, tá ið teir í morgin í síðsta umfarinum undan vetrarsteðginum fara at vitja á SAS arenuni í Herning, har FCM framvegis ikki hevur tapt.

Hóskvøldið vórðu teir báðir dystirnir, sum sunnudagin vórðu útsettir orsaka av veðri, spældir. Tá fekk Randers eitt stig, og tað bar við sær, at teir lyftu sær upp um Herfølge, sum nú er næstaftast. FC Nordsjælland er aftast, og tað er meiri enn so, at krepputekin eru at hóma í Farum.

FC Nordsjælland vóru í Silkeborg, har heimaliðið vann 2-1. Tá ið tað restaðu átjan minuttir javnaði FCN, men fimm minuttir seinni skoraði heimaliðið sigursmálið. Síðstu løtuna vóru teir í FCN undirmannaðir, tí ein teirra hevði sær reytt, eftir at hann tvær ferðir hevði fingið gula kortið.

FCN hevur bara vunnið tríggjar av seytjan landskappingardystum. Sunnudagin fara teir at fáa vitjan av Viborg. Hjá Viborg var tað stórt vónbrot, at tað ikki eydnaðist at fáa meiri enn 2-2 burturúr, tá ið teir hósdagin vóru í Randers. Viborg var á odda bæði 1-0 og 2-1, men sjey minuttir undan leikloki javnaði heimaliðið, sum við javnleikinum legði seg upp á síðuna av Herfølge í stigum. Randers er omanfyri niðurflytingarstrikuna, tí teir hava betri málmun, enn málmunurin hjá Herfølge er.

Umframt FCN-Viborg og FCM-Randers, sum verða sunnudagin, eru hinir dystirnir í átjanda umfarinum hesir: Esbjerg-FCK, AaB-OB (leygardagin) og sunnudagin er eisini Herfølge-Brøndby á skránni.


# Stjóri til Tjóðpall Føroya

**Lýst verður eftir stjóra at seta frá 1. februar 2005 ella skjótast til ber.**

Stjórin kemur at hava listarligu ábyrgdina og skal standa fyri menningini av Tjóðpalli Føroya í samstarvi við leiklista- og mentanarøkið í Føroyum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava visiónir um at menna leiklist í Føroyum og neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri Tjóðpall Føroya.

**Umsøkjarar skulu hava:**
- leiklistarliga útbúgving ella royndir innan leiklist
- leiðslu- og samstarvsevnir
- innlit í fíggjarviðurskifti og fyrisiting

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt samsvarandi 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelagnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Stjóraskeiðið er í mesta lagi 5 ár í senn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, forkvinnu í Leiklistaráðnum á telefon 35 25 04 ella annikas@setur.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til Leiklistaráðið í seinasta lagi 20. desember 2004.

**Leiklistaráðið**
Postrúm 212
FO-110 Tórshavn

att. Annika Sølvará

**Tjóðpallur Føroya er almennur stovnur, skipaður við Løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Játtanin til Tjóðpallin er 2,4 mió kr í 2004.**

**Tjóðpallurin skal sambært lógini**
- í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
- geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari palllist
- tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
- skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
- fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

**Lógarteksturin við viðmerkingum liggur á heimasíðu Løgtingsins:**
www.logting.fo/logtingsmal/logtingsmal02/vanlig%20tingmal/093.02%20tjodpallur%20foeroya.htm

# Nú er tað rætta NEYÐ-LJÓSIÐ komið

**BLACK OUT ella í NEYÐ - Hvar er ljósið tá?**

**HER!!!**
- Lyktin uttan battarí.
- Lyktin er vatntøtt.
- Lyktin flýtur.
- Lyktin hevur ON/OFF knøtt, ið er ein magnet.
- Lyktin kann altíð upploðast aftur.
- Lyktin hevur innbygda sokallaða dynamo til upploðing.
- Lyktin skal ristast í uml. 15-30 sek, so lýsir.
- Lyktin er altíð klár til brúk.
- Lyktin kann keypast frá okkum.
- Lyktin er á goymslu.



**Hon kostar einans kr. 299,-**

**SP/F CONTRIVE JSP LTD.**
FO-700 KLAKSVÍK · TEL 45 52 44 · FAX 45 69 45 · E-MAIL: CONTRIVE@CONTRIVE.FO

SetHúsaSølan
Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 14 - 17 tel 320252



**Sethús við Sandá á Selatrað til sølu**
matr. nr.56c, grundøki 1928 m². Bygd 1927.
Timburhús við stoyptari grund og loft við trimpul.
Húsini eru í 3. hæddum.
Hvør hæddin umleið 52 m². Hoyggjhús er bygt fast í húsini og er umleið 58 m².
Á stovuhæddini: gong, køkur og tvær stovur.
Á loftshæddini: gong, wc/brúsa og 5 kømur.
Kjallarahæddin óinnrættað.
Húsini standa sera veðurgott.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið.**



**Tórshavn: sethús Marknalíð 15**
matr. nr.1201b, grundøki 412 m². Byggiár 1971
Húsini eru í 3. hæddum, kjallara- stovu- og loftshædd íalt uml 262 m². Á stovuhæddini er durur, hjallur, gong, køkur, stova, hjúnarúm, 2 kømur og baðirúm. Á loftshæddini er stova, kamar og goymslurúm . Í kjallarahæddini er durur, gong, 2 stór kømur, wc, brúsa og kjallararúm. Húsini hava fingið ymiskar umvælingar, nýtt tak, allar innhurðar eru skiftar og hvítvørur so sum køli/frystari og komfýrur/eymhetta er nýtt. Frá stovu- og loftsvindeyganum er sera gott útsýni yvir Havnina, Nólsoynna og Nólsoyarfjørð.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið.**




**Tórshavn: Eigaraíbúð til sølu, Berjabrekka 19**
matr.nr.1464c, grundøki uml.133 m².
Íbúðin, ið er bygd síðst í 80-árunum, er í 2 hæddum, sera væl innrættað, stovu-og loftshædd, íalt uml. 97,4m² + úthús 5,4m².
Á stovuhæddini er: Durur,WC, gong,køkur, stova
Á Loftshæddini er: Gong, hjúnarúm, 2 kømur, baðirúm.
Frá stovuhæddini er terassa .
**Íbúðin verður seld um nøktandi boð verður givið.**



**Sethús í Sørvági til sølu**
Matr. nr. 119s, grundøkið íalt 770 m².
Húsini eru betong/timburhús frá miðskeiðis í 80-árunum. Bygd í tveimum forskotnum hæddum, íalt uml. 147m².
Á 1. hæddini er: gong, køkur, grovkøkur, hjallur, stova og WC.
Á 2. hæddini er: hjúnarúm, 2 kømur og baðirúm.
Til húsini er 9 m² úthús til goymslu.
Húsini hava fingið nýtt tak fyri sjey árum síðani og stovan er umvæld av nýggjum.
**Húsini verða seld um nøktandi boð verður givið.**



**Tórshavn: Tróndargøta 28 til sølu**
matr. nr. 315, Tórshavn, grundøki 119 m².
Húsini, ið eru í 3 hæddum. Kjallara- stovu- og loftshædd hvør uml. 45 m².
Á stovuhæddini er gong, wc, køkur og 2 stovur, eitt kamar.
Á loftshæddini er gong, 2 kømur.
Kjallarahæddin er óinnrættað,við oljufýri og brúsirúm.
Húsini eru bygd 1910, umvæld 1979, klædningurin og vindeygur skift.
Oljufýr og ketil frá 1970.
**Søluprísur kr. 900.000,- + tinglýsing og kostnað.**



**Hvalvík: grundøki til sølu**
matr. nr. 56t, stórt 579 m².
Byggibúgvið og byggiklárt:
Stykkið er útgrivið, planerað, liggur tætt við barnagarð, skúla og fótbóltsvøll.
**Minsta boð kr. 150.000,-!**

Sosialurin 341800

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við